## DJURSLAND FÓLKAHÁSKÚLI -FYRI MENNINGARTARNAÐ



**Almennur kunningarfundur um háskúla í Danmark fyri menningartarnað verður í Havn 13. juni á Hotel Hafnia kl.19.30 og í Klaksvík 14. juni á Sjómansheiminum kl.19.30**

**Fyrilestrarhaldari er H. C. Hansen, skúlaleiðari**

Djurslands Folkehøjskole
www.djfh.dk

JAVNI
www.javni.fo



LEIGA
AMBOÐ
&
MASKINUR

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00



Lesið internet Sosialin !





# P/f TJALDUR

## (fyrr p/f Skipafelagið Føroyar)

### Útgjalding av vinningsbýti

Á aðalfundi 30. mai 2005 varð samtykt at gjalda vinningsbýti til partaeigararnar. Vinningsbýtið er 100% av partapeninginum, t.e. kr. 5.050.000.

Fyri at tað skal verða møguligt at gjalda út, er neyðugt, at hvør einstakur partaeigari letur okkum hesar upplýsingar skrivliga:

**Navn á eigara, P-tal og kontonummar**
**í peningastovni (evt. tlf. nr)**
**Litra og nr. á partabrævi**

Tey flestu partabrøvini eru frá 1920'unum, og sambært viðtøkur felagsins skulu eigaraskiftir vera váttað av nevndini.

Á aðalfundi 30. mai 2005 vórðu viðtøkurnar broyttar soleiðis, at partabrøvini hereftir frítt kunnu verða seld. Men framhaldandi skal sigast frá, tá partabrøv skifta eigara, so at vit kunnu dagføra partaeigaraskránna so hvørt.

Einans tey, sum eru skrásett sum eigarar, kunnu fáa útgoldið vinningsbýti og luttaka á aðalfundi.

Felagið, sum áður æt p/f Skipafelagið Føroyar, broytti í 2004 navnið til p/f Tjaldur.

Gerið so væl at skriva til:

**P/f TJALDUR**
teldupostadressa: STATUS@POST.OLIVANT.FO
Postrúm 250
700 Klakksvík

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A



## Akfør og amboð til sølu

Tórshavnar kommuna setur hesi akfør og amboð til sølu:

**Trumla**
ABG 128 8 tons
Árg. 1977

**Vørubilur við skaða**
Ford Escort van
Árg. 2000

**Lastbilur**
Scania PH 6x4
Árg. 1993

**Viðfestisvognur**
við tveimum akslum og kalesju
Árg. 1996

Upplýsningar um akførini og amboðini kunnu fáast við at ringja til Símin Jákup Hansen tlf. 302010 ella 219243

S N A R S K I V A N
www.torshavn.fo


veitst tú ikki tað?
Sosialurin


VR BILAR

## Læripláss

VR-Bilar søkir eftir lærlingi til eykalutagoymsluna at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarar skulu hava lokið FHS-prógv. Í lærutíðini skal lærlingurin á danskan skúla nakrar viku um árið.

Lærutíðin er 3 ár, og lærlingurin fær løn í allari lærutíðini eftir galdandi sáttmála.

Allar umsóknir við prógvum skulu sendast til:
**VR-Bilar Sp/f**
Hoyvíksvegur 61
Postsmoga 3130
FO-110 Tórshavn

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja til Agatu Sørensen á telefon 322110.

**Um VR-Bilar:**
VR-Bilar er ein bilafyritøka í støðugari menning, sum selur persónbilar av merkinum Volvo og Renault, umframt Volvo lastbilar og bussar.

Afturat bilasøluni eru knýtt 2 verkstøð. Eitt persónbila- og eitt lastbilaverkstað. Til at veita hesum tænastu er ein eykalutagoymsla.

Á VR-Bilum arbeiða í løtuni 18 fólk. Harav eru 12 mekanikarar og 2 fólk eru á eykalutagoymsluni.


Lesið Sosialin -so eru tit við!


# Endurlýsing Varaleiðari

Umlættingarheimið Dáin í Klaksvík søkir eftir varaleiðarai at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, ávikavist dagvaktir, kvøld, nátt og vikuskiftisvaktir, tó mest dagvaktir.

Setunar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Dáin er ein samdøgustovnur, har børn, ung, vaksin og eldri menningartarnað koma til umlætting í styttri ella longri tíðarskeið. Talan er um bæði skipaða umlætting, har teir ávísu bólkarnir eru til umlætting hvør sær og um vanliga umlætting, har fleiri aldursbólkar eru umboðaðir samstundis. Pláss er fyri 5 fólkum í senn.
Umframt døgnumlætting hevur Dáin eisini eina dagumlætting, har 3 børn/ung koma dagliga, gerandisdagar kl. 10.00 - 17.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 457185, gerandisdagar millum kl. 10.00 - 11.00.

Umsóknarfreistin er 1. juli 2005 og skulu umsóknir við prógvi, viðmælum v.m., stílast til:

**Umlættingarheimið Dáin**
Mýrivegur 11
700 Klaksvík
Att: Leiðarin